


75 ára føðingardagur.

Í sambandi við at Timburhandilin hevur 75 ára stovningardag verður móttøka á Hálsi í Tórshavn **fríggjadagin tann 31. oktober millum kl. 15 og 17.**

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN

**Tórshavn:** Tel 31 12 50 • Fax 31 54 60 • ht@ht-tilfar.fo
**Sandur:** Tel 36 12 50 • Fax 36 11 50 • ht@ht-tilfar.fo • **Kambsdalur:** Tel 44 44 41 • Fax 44 48 41 • ht@ht-tilfar.fo
www.timburhandilin.fo


lesandi.fo:

# Skal hjálpa næminginum



*Regin Dalsgaard er verkætlanarleiðari handan lesandi.fo. Ein internetportalur fyri føroysk miðnámsskúlalesand i við óteljandi møguleikum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Týsdagin varð enn ein nýggj heimasíða løgd út á alnetið. Talan er um portalin www.lesandi.fo, sum er ætlaður føroyskum miðnámsskúlalesandi**

ALNETIÐ
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Við nøkrum eldsálum á odda hevur tað eydnaðst LFÚ at skapa ein internetportal fyri føroysk miðnámsskúlalesandi. Talan er um www.lesandi.fo. Ætlanin var av fyrstan tíð at geva eitt blað út, men av tí, at kostnaðarstøði var ov høgt, valdi Landsfelag Føroyinga í Útbúgving heldur ein internetportal.

Arbeitt hevur verið við verkætlanini í seks mánaðir, og hetta hevur kravt nógv og hart arbeiði. Men týsdagin var heimasíðan klár til almannakunngerðing.

### Barnasjúkur

– Endarnir hanga saman nú, men enn eru nøkur smáting, sum vanta. Men tað er bert talan um barnasjúkur, greiðir Regin Dalsgaard, verkætlanarleiðari frá.

Málið við portalinum er, at fáa fesk tíðindi inn hvønn dag, sum næmingar á miðnámsskúlunum sjálvir skriva.

Arbeiðið er uppbýtt soleiðis, at nakrir næmingar eru valdir út at skriva til portalin, og teir hava fingið eitt digitalt myndatól, sum teir skulu nýta í sambandi við skrivingina.

– Tað eru útvald fólk, sum skriva til heimasíðuna. Vit krevja tey bestu, so tað er ikki ein og hvør sum sleppur at skriva, sigur Regin. Eisini verður skipað fyri work-shops fyri teimum skrivandi næmingunum, har teir verða settir inn í tað grundleggjandi.

– Ætlanin við portalinum er, at hann skal hjálpa næminginum í tí dagliga.

Hjálpin kann koma nógvastaðni frá. Í og við tíðindunum, sjálvandi, men á portalinum eru eisini uppgávusavn, Torgið, on-line lestrarvegleiðing og mangt annað.

Í uppgávusavninum kunnu næmingar leita eftir uppgávum inn og leggja uppgávur inn sjálvi til íblástur til onnur. Stigtakararnir ásanna, at talan kann verða um misnýtslu av uppgávusavninum, men tað í síðsta enda er upp til hvønn einstakan at taka støðu til, hvussu uppgávurnar kunnu nýtast. Lærarar hava sjálvandi eisini atgongd til portalin, so tað ber til hjá teimum at kanna, hvørt næmingar misnýta uppgávusavnið ella ikki.

Á Torginum ber til at selja bøkur, leiga kømur og annað, ið ein fær hug til at selja ella keypa.

On-line lestrarvegleiðing inniber, at næmingar kunnu skriva spurningar til lestrarvegleiðararnar, sum arbeiða hjá LFÚ. Teir svara so aftur innan 24 tímar, og til ber at fáa svar privat ella á síðuni, sum onnur, so eisini kunnu lesa.

### Fígging

At byrja við skulu greinarnar góðkennast áðrenn tær verða lagdar út til øll at lesa. Talan er ikki um rættlestur, men tær verða fyrst lisnar ígjøgnum fyri at vita, um hetta er nakað, ein kann leggja út alment.

Portalurin brúkar somu skipan, sum Internetsosialurin ger, og tað eru Dynamic Paper.

Tað, sum hevur tikið mest tíð, er at fáa fígging til verkætlanina, sum hevur verið kostnaðarmikil. Men hon er nú vorðin fíggjað ígjøgnum lýsingar og ymsar grunnar, og vænta stigtakararnir, at meira pengar verða tøkir fyrst í næsta ári, tá grunnarnir verða fyltir av nýggjum.

– Vit vóna, at øll fara at taka væl ímóti nýggja portalinum. Hann er als ikki ætlaður sum nøkur kapping til fjølmiðlarnar, men sum ein síða, til lesandi, verður sligið fast.

Miðað verður ímóti at hava millum 500 og 1000 vitjandi um dagin.



## NAME er ikki nóg áhugavert

**Íleggingarfelagið, Notio, gav aldrin nakað tilsøgn um, at felagið fór at leggja pening í plátufelagið, NAME, sum nú fer á heysin. Høvuðstrupulleik in er, at verkætlanin hjá plátufelagnum er ikki nóg áhugaverd at spýta pening í**

ÍLEGGJARAR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Í samrøðu við Dimmalætting í gjár greiddi managerin hjá Brandi Enni frá, at ein av høvuðsorsøkunum til at plátufelagið NAME fer á heysin er, at íleggjarafelagið, Notio, trekti seg. Plátufelagið NAME varð stovnað í januar í ár, og ætlanin var alla tíð, at íleggjarar skuldu koma upp í verkætlanina. Hetta hendi tó aldrin. Úrslitið er, at felagið nú fer á heysin.

### Ikki haldbart

Kristian Petersen stjóri á Notio sigur, at Notio aldrin gav plátufelagnum nakra tilsøgn um, at íleggingarfelagið fór at spýta pening í.

– Vit fingu eina verkætlan á borðið, sum vit, við hjálp av granskoðara, ikki mettu verða haldbara. Uppleggið var ikki nóg gott, og tí valdu vit ikki at leggja pengar í plátufelagið, sigur Kristian Petersen

Hann vísir aftur, at Notio gav NAME fyrst eina tilsøgn um at leggja pening í, og síðan tók hana aftur.

### Verkætlanin avgerandi

Spurdur, um tónleikur sum heild ikki er ein vandamikil íløga, svarar stjórin á Notio, at sum íleggjari er ein noyddur at hyggja nágreiniliga eftir teimum verkætlaninum, sum fyriliggja, og síðan skal støða takast, um hon er nóg áhugaverd, og hvat viðvíkur plátufelagnum NAME, var verkætlanin ikki nóg áhugaverd fyri okkum, slær Kristian Petersen at enda fast.



# NAME í neyð

**Vánalig søla í Danmark og vantandi íløguhugur í Føroyum hava gjørt enda á føroyska plátufelagnum NAME, sum skuldi fáa Brand Enni fram uttanlands. Høvuðsmaðurin aftan fyri plátufelagið heldur tað vera eitt sjokk, at føroysk feløg ikki vildu seta pengar í ætlanina**

TÓNLEIKUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Stóra ætlanin at fáa føroyska poppidolið Brand Enni fram í útlondum hevur fingið eitt álvarsamt skot fyri bógvin.

Dimmalætting skrivaði í gjár, at plátufelagið NAME, ið er útgávufelagið hjá Brandi Enni, verður upployst og endar í skiftirættinum í næstu viku.

Tað er bara eitt hálvt ár síðani, at stóra ætlanin at gera tónleikin hjá Brandi kendan uttanlands fór av bakkastokki í Danmark. Men lítil søla, vánaligir samstarvspartar og manglandi íløguhugur í Føroyum hótta nú plátufelagið NAME og alla ætlanina at fáa Brand fram uttanlands.

– Tað trýtur ikki við hugskotum og talenti í føroyskum tónleiki, men viljin til at seta pening í er lítil, og uttan fígging ber tað snøgt sagt ikki til at fáa føroyskan tónleik út um landoddarnar, sigur Steintór Rasmussen, sum er høvuðsmaður aftan fyri NAME.

### Sjokk

Ætlanin við NAME var, at føroyskur tónleikur skuldi fáast fram uttanlands og byrjað varð í Danmark við kanska besta føroyska kortinum – poppidolinum Brandur Enni.

Men skuldi tað eydnast, máttu nógvir pengar til fyri geva tónleikin út, promovera hann og hava konsertir í Danmark.

NAME skuldi fáa íleggjarar at seta pening í plátufelagið, so felagið fekk eitt fíggjarligt grundarlag at virka á. Sum skilst á Steintór Rasmussen vóru bæði Framtaksgrunnurin og Notio áhugað í at seta pening í verkætlanina.

– Meiningin var alla tíð, at íleggjarar skuldu seta pening í NAME. Vit høvdu fleiri fundir bæði við Framtaksgrunnin og Notio um samstarv. Bæði feløgini góvu undir samráðingunum tilsøgn um undir, at tey vóru áhugað, men tá kom til stykkis meldaðu tey frá. Eg kann róliga siga, at tað kom sum eitt stórt sjokk hjá okkum, greiðir Steintór frá.

Hann leggur enn einaferð dent á, at hugskotið við NAME var bygt á, at íleggjarar skuldu upp í, og tá tað so ikki hendir, gert tað ómøguligt hjá plátufelagnum at halda fram.

### Nógvir pengar

Síðan NAME fór at virka í januar í ár, hevur felagið nýtt nógvan pening til serliga at promovera Brand Enni. Nógvur peningur er nýttur til ferðing aftur og fram, framleiðslu av tónleiki, tiltøkum, umfram at nógv fólk hava verið knýtt at verkætlanini.

*Brúktu tit ikki bara nógvan pening, sum tit í grundini ikki høvdu at ráða yvir?*

– Tá vit høvdu fingið tilsøgn um pening frá bæði Notio og Framtaksgrunninum, trúðu vit, at peningurin alla tíð var har, men tá tað so vísir seg at teir ikki eru har, er ikki annað at gera enn at svimja í land aftur. Høvdu vit vitað, at teir meldaðu frá, høvdu vit ikki satsað eins stórt, slær Steintór fast.

### Eingin torir

Steintór Rasmussen heldur tað er ein stórur trupulleiki fyri føroyskan tónleik, at so fá íleggjarafeløg hætta sær inn í tónleikaheimin.

Hann sigur, at um tað vísir seg, at um eingin váðar at seta pening í verkætlanina við Brandi Enni, er als ikki óhugsandi, at hann leitar sær uttanlands eftir stuðli.

Í løtuni arbeiðir Steintór tó við at fáa áhugaðar íleggjarar í Føroyum upp í leikin.

### Sorgarleikurin Danmark

Brandur Enni hevur seinastu árini verið eitt satt poppidol millum føroyska ungdóm. Íslendingar vóru eisini skjótir at taka evnaríka føroyingin til sín. Danir vísa tvørturímóti ikki serliga stóran áhuga fyri tvøradreingin.

NAME legði nógv fyri at promovera Brand í Danmark, men úrslitini hava ikki verið góð, og sølan av útgávuni hjá Brandi hevur verið lítil.

Orsøkin til vánaligu úrslitini í Danmark er sambært Steintór eina blanding av fleiri faktorum.

- Vit mugu viðurkenna, at okkara samstarvsavtalir í Danmark ikki hava verið nóg góðar. Millum annað skuldi felagið, Arts People, standa fyri at fáa Brand í sølubúðirnar, men hetta gekk striltið, so tann parturin eydnaðist illa, sigur hann

Steintór Rasmussen leggur afturat, at hóast sølan ikki hevur gingið væl, so er kortini okkurt at gleðast um. Hann vísir á mongu konserturnar, sum Brandur hevur luttikið á í summar, har danir hava fingið høvið at hoyra evnaríka tvøradreingin.

### Fekk tilboð

Fyri einum góðum ári síðani fekk Steintór Rasmussen tilboð um at lata hugskotið við Brandi til danska plátufelagið, RecArt, sumk hevði hug at geva tónleikin út í Danmark. Men fólkini aftanfyri Brand søgdu nei takk til tilboðið.

*Átti tú ikki at tikið av tilboðnum frá RecArt ?*

– Tað kann virka so í dag, at tað hevði verið rætta avgerðin, men eingin sigur, at danska plátufelagið hevði fingið meira úr Brandi. Vit fingu sett stór krøv til ein møguligan sáttmála við RecArt, og saman við familjuni hjá Brandi avráddu vit at takka nei til tilboðið.

*Er tað kortini ikki størri møguleiki, at eitt roynt danskt plátufelag hevði fingið meir úr Brandi enn tú?*

– Tað er væl møguligt, og man kann seta spurning við tað í dag, men eg haldi framvegis ikki, at tað hevði verið undir røttum fortreytum, um vit lótu teimum rættindi til ætlanina við Brandi, sigur Steintór Rasmussen.

Spurdur, um hann hevur fingið nóg nógv burturúr Brandi, svarar Steintór, at tað mugu onnur meta um, og sum støðan er júst í løtuni, kann møguliga ein niðurstøðan verða, at ov lítið er komið burturúr.

– Spurdi tú sama spurning fyri hálvum ári síðan ella spyrt tú aftur um eitt hálvt ár, so hevði svarið hjá teimum flestu kanska verið eitt annað. Lat meg sláa tað fast, at feilurin liggur so ikki hjá Brandi sjálvum, men eftir míni meting í vantandi kapitali, sigur Steintór Rasmussen.

SKEIÐSTOVAN KVASIR FAROdANE

**Skeið í Microsoft Certificering**

Í samstarv við **Microsoft Technical Education Center** í Danmark, fara vit at bjóða tvey Microsoft Certificeringsskeið á KVASIR fyrst í desember.

**Updating Systems Administrator Skills from Microsoft Windows 2000 to Windows Server 2003**
2 x kl. 08:30-15:30: 01/12 + 02/12

**Updating Systems Engineer Skills from Microsoft Windows 2000 to Windows Server 2003**
3 x kl. 08:30-15:30: 03/12 + 04/12 + 05/12

Tel **320 204**
**www.kvasir.fo**